WWW.SMYRIL-LINE.COM

## SMYRIL LINE SØKIR
# KT-fólk
### at arbeiða umborð á Norrönu

Arbeiðsuppgávan er fyrst og fremst at umsita søluskipanina OSCAR frá ADS Anker saman við núverandi KT-manninum umborð. Arbeiðsøkið liggur undir KT-deildini á landi, men megin-parturin av arbeiðsuppgávunum eru sjálvstøðugar. Eisini skal tann, sum settur verður, kunna taka lut í dagliga rakstrinum av KT-umhvørvinum umborð.

KT-umhvørvið umfatar Windows ambætarar, arbeiðspláss og harafturat ymiskan net-útbúnað. Stýrisskipanirnar eru Windows 2000 og Windows XP. Onnur forrit eru m.a. MS Office, MS Exchange, bókingarskipan til skipsferðir v.m.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Viðlíkahald av upplýsingum í OSCAR
- Umsiting av OSCAR
- Vegleiðing til OSCAR-brúkarar
- Net- og telduumsiting
- Aðrar KT-uppgávur eftir førleika og avlopstíð

**Persónligir eginleikar:**
- Nærlagni
- Støðufesti
- Hugur at ogna sær nýggjan førleika
- Kunna arbeiða á skipi
- Góð samstarvsevni

**Førleiki:**
- Drúgvar royndir innan KT og/ella søluskipanir
- Duga í minsta lagi enskt sum arbeiðsmál
- Í minsta lagi teldukoyrikort ella samsvarandi teldukunnleika
- Teldukunnleiki á hægri støði er ein fyrimunur
- Kunnleiki til skipanina OSCAR er ein stórur fyrimunur
- Royndir á sjónum er ein fyrimunur
- Kunnleiki til dátusøvn (t.d. SQL) er ein fyrimunur
- Góður kunnleiki til teldunet er ein fyrimunur

**Arbeiðstíð:**
Vanliga ein mánaða umborð og ein mánaða heima. Fyrstu tíðina kann tó gerast neyðugt at vera umborð longri til tess at fáa upplæring.

**Løn:**
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Umsókn við CV, prógvum og skjalprógvum annars verður at senda til:

**Smyril Line**
**postboks 370**
**110 Tórshavn**
**Att.: Sámal Olsen, KT-leiðari**

Í seinasta lagi 10. juni 2004. Umsóknir eftir henda dag kunnu tó verða viðgjørdar, um serligar umstøður gera seg galdandi.

Meir fæst at vita við at venda sær til Sámal Olsen, KT-leiðara, á tlf. 345811 ella 214328, ella til KT-mannin umborð, Julius Djurhuus, tlf. 344992, ella við telduposti: it@norrona.fo.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

# Yamaha Virago 1100



Árg. 94, km 35.400. Til sølu fyri 80.000 kr.

**Tlf. 317996 ella 283996**

## Álítandi fólk til Restaurant Marco Polo

Vit søkja eftir einum røskum og arbeiðssomum fólki, ið dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tú verður álitisfólk og fer at arbeiða í skiftandi vaktum.

Løn sambært avtalu.
Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vinarliga ring
31 34 30 ella 21 34 30

MARCO POLO

www.marcopolo.fo

Sosialurin 341800

## BILUR TIL SØLU



**Prísur kr. 125.000,-**
Anlegg við forsterkara og bassi fylgir við
Til sølu vegna flyting

TEL 22 15 14

## Campingvogn



Vit eru á campingplássinum á Eiði og vísa fram tað nýggjasta innan campingvognar.

**Leygardagin 29. mai kl. 14 - 19**

Høvi verður eisini at gera avtalu um leigu av campingvogni í summar

HANSEN · tel 217 142 - 218 540 · www.hansen.fo

Sosialurin 341800

## FISH & CHIPS

NÝTT

# STÓRAR INNBAKAÐAR RÆKJUR

**v/chips og 1/2 L av sodavatn frá Føroya Bjór**

# kr 45,-

Upplatingartíðir:

| | |
|---|---|
| mán-týs-mik | 12-14 og 17-23 |
| hós-frí | 12-14 og 17-24 |
| leyg | 17-24 |
| sun | 17-23 |

FISH & CHIPS · tel 317405

Sosialurin 341800

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Landsliðsvenjari í hondbólti

Søkt verður eftir landsliðsvenjara til A-landsliðið hjá monnum í hondbólti. Seinasta freist at søkja er 4. juni 2004. Umsóknin skal sendast til:

**HSF**
**Postboks 1023 · 110 Tórshavn**
**Tlf. 319669**

*Vit gera alt:*
*URTAGARSÐARBEIÐI*
*So sum:*
*Grasvallir, planting og viðlíkahald. Vit gera eisini tún við flísum ella oljugrúsi.*

*Vit seta gravsteinar upp.*

*Vit átaka okkum eisini graviarbeiði sum t.d. at skifta oljutanga og tilíkt.*

*SPYR - TAÐ KOSTAR EINKI!*

**Fa. Símun Dalsgaard**
Boðanesgøta · FO-188 Hoyvík
Tel 31 54 78 · Fartel 28 21 00
Fax 32 04 78

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



# Hátrýstvaskarin!



**Kring landið**

Vit hava ognað okkum ein hástr stvaskara við trýsti, ið er 500 bar. Tá ið tað snýr seg um at reinsa bygningar, húsagrundir, tøk, tún, gólv og annað tílíkt, loysir tað seg at lata júst hendan sterka hástrýstvaskaran loysa uppgávuna. Tað ger heldur ikki mun, hvar í landinum arbeiðið skal gerast. Hann er lættur at flyta.



**Við veggin**

Vanliga hástr stvask okkara við 500 bars trýsti og heitum ella køldum vatni megnar alla reingerð. Vanlig óhumska, gróður og leys máling fúka av sum einki. Er málingin føst, verður sandur eisini nýttur. Tá loysnar øll máling lættliga. Verður farið at loysa størri veikleikar í pussa um betongi, verður sama viðgerð nýtt.



**Á takinum**

Tá ið tøk verða vaskað, nýta vit serligan takreinsara. Trygdin er í hásæti, og framleiðararnir hava eisini tryggjað, at eingin vandi er á ferð, tá ið asbesttøk verða vaskað. Serstøk verja er á takreinsaranum. Hon tryggjar, at takið verður vaskað væl og virðiliga, hóast tað ikki spruttar. Vatnið rennur niður í takrennuna.

## Ring 42 31 11

**SANDBLÁSING**
VEGGJAREINSAN & TAKREINSAN

Spf. Sandblásing · 466 Ljósá · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo

**Sunnudag og mánadag frá kl. 11.30**

## Hvítusunnumenu

### Rómatilgjørd fiskasuppa



### Bóndasteik
**við kryddsmøri, dagsins grønmeti og eplum**

### Heimagjørdur ísur
**við frukt**



3 rættir 165,-
2 rættir 135,-
Børn ½ prís

RIO · BRAVO RESTAURANT

RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67

• Beef & Steak House •

team85

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin við Løkjatún**
Í dagstovninum í Løkjatúni fara at ganga 72 børn í aldrinum 0 til 8 ár

Stovnurin er skipaður í eina vøggustovu og eina barnagarðsstovu, harumframt hýsir stovnurin børnum úr 1. flokki í Argja skúla.

**Vit bjóða**
9 áhugaverd størv, har starvsfólkið, saman við leiðaranum fær møguleika at seta sín dám á stovnin og taka lut í øllum tí, sum krevst fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan

www.torshavn.fo

## Pedagogar og hjálparfólk til nýggja dagstovnin í Løkjatúni

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum og hjálparfólki til dagstovnin í Løkjatúni at byrja 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Søkt verður eftir**
- tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna
- trimum pedagogum at arbeiða 35 tímar um vikuna
- tveimum hjálparfólkum at arbeiða 40 tímar um vikuna
- tveimum hjálparfólkum at arbeiða 25 tímar um vikuna

**Vit vænta**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði. Vit vænta, at tú ert opin fyri bygnaðarbroytingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Charlottu á Váli Olsen, stovnsleiðara, tlf. 314989/257216 ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juni 2004. Viðmerkið umsóknina: "Pedagogur Løkjatún".

# Universitetsútbúgvingar á Náttúruvísindadeildini

Í summar kanst tú byrja at lesa á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Útbúgvingarnar eru:

- BSc í ravmagnsverkfrøði
- BSc í kolvetnisverkfrøði
- BSc í jarðalisfrøði
- BSc í teldufrøði
- BSc í lívfrøði

Verkfrøðingaútbúgvingarnar taka 3 1/2 ár, meðan hinar taka 3 ár. Útbúgvingarnar eru skipaðar í modulum, og tí ber eisini til at melda seg til og taka prógv í einstøkum lærugreinum.

**Upptøkutreytir**
Fyri at lesa lívfrøði krevst antin stødd-, alis- og evnafrøði á B-stigi ella B-stig í stødd- og alisfrøði saman við C-stigi í evnafrøði og A-stigi í lívfrøði. Fyri at sleppa inn á hinar fýra útbúgvingarnar krevst stødd-, alis- og evnafrøði á ávikavist stigi A, B og C. Aðrar fortreytir kunnu koma upp á tal eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri. Kunning um upptøkukrøv til einstakar lærugreinir fæst frá Náttúruvísindadeildini ella á heimasíðuna hjá Fróðskaparsetrinum www.setur.fo

**Umsóknarbløð**
Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina. Á heimasíðuni er kunning um útbúgvingarnar.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Postboks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er *1. juli 2004*. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 16. juli 2004. (Næstu ferð, tikið verður upp, verður í 2006).

Meir fæst at vita um lestrarmøguleikarnar við at vitja á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni 3 í Tórshavn ella við at ringja á telefon 352550.